# Skrivstovufólk/Starvsfólk

**Av tí at øktar uppgávur eru á útbreiðsludeildini, er eitt áhugavert starv hjá okkum leyst at søkja**

**Høvuðsuppgávur:**

- Haldaratænastan
- Samskifti við starvsfólkið kring landið
- Postgreiðsla/Telefongreiðsla
- Vanligt skrivstovuhald

## Førleikakrøv:

**Vit vænta, at tú hevur viðkomandi royndir:**

- Skrivstovukunnleika
- Kunnleika í nýtslu av teldu
- Fyrikomandi og góð samstarvsevni
- Førleika til at arbeiða sjálvstøðugt
- Koyrikort

– og dugir at arbeiða í einum umhvørvi, har úrslit, tænasta og deadline eru lyklaorð.

Setanar- og lønartreytir verða sambært avtalu, og starvið verður at seta skjótast til ber. Tó bíða vit fegin eftir rætta viðkomandi.

## Umsókn:

**Umsókn við prógvum o.ø. skal sendast til:**

Prentmiðstøðin
Mrk.: Umsókn
Postboks 3314
110 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 28. apríl 2008.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til
Hallstein Sigurðsson, samskipara, á telefon 564600

P/F Prentmiðstøðin varð stovnað á sumri 2000, tá Dimmalætting og Sosialurin løgdu blaðprentsmiðjur sínar saman. Endamál felagsins er at prenta bløð umframt at bera bløð út.
Í løtuni prentar felagið tey flestu bløðini, sum koma út í Føroyum, og stendur harafturat fyri flutningi og útbering av Dimmalætting og Sosialinum fimm ferðir um vikuna. Vit bera eisini reklamur til hvørt húsarhald .

**Prentmiðstøðin**





Lesið

Sosialin

-so eru tit við!

W W W . S O S I A L U R I N . F O



# Føroya Handilsskúli á Kambsdali søkir eftir LÆRARUM

at undirvísa á HH og FHS frá 1. august 2008. Hevur umsøkjari útbúgving, sum nøktar fleiri lærugreinir, kann talan gerast um fast starv. Samanlagt er talan um fimm fulltíðarstørv.

## Tímar og lærugreinir:

### Lærarastørv:

Føroyskt A/C 8 t/v, Samfelagslæra C 8 t/v, Marknaðarførsla C 8 t/v, Kunningartøkni C 8 t/v, Støddfrøði C 5 t/v, Sølubúskapur B, 12 t/v, Sálarfrøði C 8 t/v, Vinnulívsrættur C 6 t/v, Mentanarfatan C 4 t/v, Dekoratión C 3 t/v

### Avloysarastørv:

Føroyskt A/C 20 t/v, Danskt A 15 t/v

### Arbeiðsuppgávur

- undirvísa í viðkomandi lærugreinum
- leggja til rættis undirvísingargongdir
- luttaka í toymisarbeiði
- vera við í ráðlegging skúlans
- luttaka í verkætlanum, sum skúlin skipar fyri

### Vit vænta, at tú

- hevur viðkomandi útbúgving á kandidatstigi ella aðra hægri útbúgving saman við serfrøðingavitan til lærugreinir á A- og B-stigi.
- hevur viðkomandi útbúgving á bachelor-stigi ella aðra hægri útbúgving saman við serfrøðingavitan til lærugreinir á C-stigi.
- hevur áhuga í undirvísing
- dugir væl at samstarva og samskifta
- vilt vera við at menna skúlan
- ikki ræðist nýggjar avbjóðingar

### Vit kunnu m.a. bjóða

- eitt fakligt mennandi umhvørvi
- eftirútbúgvingarmøguleikar
- góðar arbeiðsumstøður
- ein spennandi og lívligan gerandisdag

### Løn

Lærarar verða løntir eftir sáttmála millum Lærarafelag Handilsskúlans og Fíggjarmálaráðið.

### Umsókn

Umsóknin skal stílast til Føroya Handilsskúla og sendast til Føroya Handilsskúla á Kambsdali, 530 Fuglafirði. Umsóknirnar skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 9. mai 2008. Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Páll Isholm, deildarstjóra, á telefon 444900/219930 ella pall.isholm@skulin.fo

**FØROYA HANDILSSKÚLI**

Føroya Handilsskúli á Kambsdali | Kamsdalur | FO-530 Fuglafjørður
Tel. +298 444900 | Faks 444901 | www.fhk.fo | fhk@skulin.fo

**Um skúlan:**
Á Føroya Handilsskúla á Kambsdali eru vit 320 næmingar og 36 starvsfólk. Vit fyriskipa og taka FHS og HH útbúgvingarnar, fjarlestur, ítróttarbreyt, akademimerkonom og skeið. Vit stremba til eina og hvørja tíð eftir at virði skúlans dygd, opinleiki, virðing og framfýsni eyðkenna alt virksemi skúlans.

VASTI 459010